miðvikan

Nr. 208 • 28. okt. 2008

Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar



Elsa Jacobsen:

# Synirnir bjargaðir frá slagmarkini - blivu gøtumenn

**Kollveltingin er á fallandi fót. Jákup og Jóhannes verða sum við einum undri bjargaðir frá nærum vissum deyða. Lyftini um eitt betri lív fyri fólkið hava víst seg at vera virðisleys. Stýrið er í trongum skóm av uppreistri norðuri í landinum, og 21. mai 1991 rýmir leiðarin Mengistu Haile Mariam av landinum. Hesa søguligu tíð upplivdi Elsa frá byrjan til enda**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**12. partur**

## Á veg í kríggj og deyða

Vit vóru tvær frá missiónsstøðini í Geresse niðri í Dembele og vaksineraðu smábørn og barnakonur. Hesa ferð vóru vit saman við teimum, sum arbeiddu á klinikkini hjá tí almenna. Í Dembele eru tvær bygdir. Tað tekur ein tíma at ganga millum tær.

Vit býttu okkum sundur, so vit fóru í hvør sína bygd. Tískil fingu vit vaksinerað nógv fólk móti difteri, kikhosta, stívkrampa, meslingum og tuberklum.

Ein dagin hoyrdi eg dun av bili og kristiligum sangi. Eg fór út og sá ein lastbil koyra framvið á veg til Arba Minch fullan av syngjandi ungdómi. Tey søgdu mær, at hetta vóru ungir menn, sum vórðu sendir í kríggj móti uppreistrarmonnum norðuri í landinum. Men útlitið fyri hesar ungu menn var ikki gott. Nógvir vóru blaðungir dreingir, sum ikki høvdu nakra sum helst útbúgving ella royndir sum hermenn. Teir skuldu berjast móti royndum uppreistrarmonnum.

Summir av teimum vóru trúgvandi og sungu kristnar sangir. Hinir tóku so undir við niðurlagnum.

Songurin hoyrdist eina løtu, meðan koyrt varð oman brekkuna, men so kámaðist hann burtur.

Nógv vóru tey, ið grótu hendan dagin, tí tey máttu lata menn og synir fara í krígg vitandi av royndum, at fáur ella eingin kom aftur á lívi. Men tað var ikki loyvt at syrgja. Tað var ein æra at geva lívið fyri landið!



*Jákup vm og Jóhannes sluppu sum við einum undri undan at verða sendir í kríggj og nærum tann vissa deyðan. Nú búgva teir í Norðragøtutúni. Her eru teir framvegis í Etiopia í 1995*

## Jóhannes og Jákup mundu eisini enda á slagmarkini

Jákup og Jóhannes kundu eins væl eisini fingið hesa lagnu. Teir vóru báðir farnir til Addis Abeba at fáa sær arbeiði. Har komu teir at búgva hjá eini gamlari konu. Teir búðu í einum lítlum tilbygningi til hús hennara.

Tá hendi tað, at hermenn gingu hús úr húsi, har teir vistu, at ungir dreingir hoyrdu heima, at noyða teir í hertænastu. Teir komu inn til hesa konuna og spurdu, um tað ikki búðu tveir dreingir har? Jú, tað kundi hon bara vátta. Men hvar vóru teir? Nei, tað visti hon ikki. Hermenninir fóru so at leita. Teir fóru í hvørt skot og hugdu alla staðni, har nakar kundi hugsast at krógva seg. Men – tað má hava verið einglavernd – teir fóru ikki at leita í tilbygninginum, har dreingirnir vóru.

Teir vaknaðu sjálvir av hundinum í húsinum, sum fór at goyggja, tá ið hermenninir komu á dyr. Teir hoyrdu eisini hjartkiptir, hvussu leitað varð eftir teimum. Men teir kundu bert halda seg kúrrar.

Morgunin eftir sluppu teir sær til rýmingar. Teir høvdu so avgjørt ongan hug til at fara í nakað kríggj. Teir búðu eina tíð hjá prestum í Mekane Yesus kirkjuni, sum vit kendu.



*Gravprýði. Hesin maðurin hevur verið ein brandur! Her sæst, hvussu mongum monnum hann hevur verið at bana*

## Grøvin vísti talið á dripnum

Jarðarferðarsiðir eru so ymiskir. Í Konso plagdu vit at ganga eftir gøtu, sum gekk gjøgnum ein stóran akur. Kornið vaks høgt báðu megin við. Á akrinum vórðu fólk jarðað. Her kundu vit síggja heidningagravir, sum vóru prýddar við myndum, sum vístu, hvussu nógvar mans hesin maður drap, meðan hann var á lívi. Hesin var hildin at vera ein hetja. Honum hevur tí verið sýndur tann heiðurin at fáa ein slíkan minnisvarða á grøvina.

Tað er ikki altíð, at tað verður gjørt so nógv burturúr tí sjónliga eftirmælinum sum í hesum førinum. Seinni kom ein kristin kirkjugarður, sum hoyrdi til kirkjuna.

## Jól og páskir í Etiopia

Í Etiopia verður tann gregorianski kalendarin brúktur. Tí er neyðugt hjá okkum at hava tveir álmanakkar. Árið byrjar við 1. Meskerem, sum er 11. september. Hesin dagur er lættur at minnast!

Í november hava teir triðja mánaðin, nevndur Hidar, og teirra árstal er átta og eitt hálvt aftaná okkara. Teir eru nú í ári 2001.

Jólini eru 29. Tahisas, sum er fjórði mánaður. Hjá okkum er hetta 7. januar. Um hesa tíðina er turt og sólin skínur uppá tað heitasta.

Tey, sum hoyra til koptisku kirkjuna, halda jól á tann hátt, at farið verður í kirkju út móti midnátt jólaaftan, og verða tey